SENDISTOVAN

KEYP FØROYSKT

Bakgrund

Tað er ein sannroynd, at føroyingar í stóran mun keypa innfluttar vørur úr Danmark og føroyskar vørur trupult við at fáa eins góð hyllapláss instore promovering, sum útlendskar vørur. Harumframt eru útlendskar vørur at síggja í lýsingum á netinum og í øllum teimum útlendsku sjónvarpsrásunum, sum føroyingar síggja.

Ein avleiðing er, at føroyskar vørur sum heild ikki standa seg nóg væl í kappingini við útlendskar vørur, hóast tær í mongum førum eru fult kappingarførar í prísi, góðsku og umhvørvisvernd, eitt nú mjólkarvørur, sápa, øl, kjøt, plastposar, fiskur, klæðir o.m.a.

Vit meta tað tískil vera upplagt og átroðkandi at geva føroyskt framleiddum vørum betri atgongd til marknaðin, so føroyski brúkarin, framleiðarin og búskapurin fáa sín fult uppiborna ágóða og vinning.

Endamál

Við einum felags sølu- og marknaðarátaki at vekja ein "keyp føroyskt" hugburð millum føroyingar og skapa aktivan eftirspurning eftir føroyskt framleiddum vørum og harvið økja framleiðsluna, søluna og vinningin upp á stutt sikt og skapa vøkstur, økt kappingarføri og útflutningsmøguleikar upp á longri sikt.

- Skapa størri eftirspurning eftir føroyskt framleiddum vørum
- Skapa meiri vørumenning og framleiðslu
- Skapa betri kappingarføri mótvegis útlendskum vørum
- Skapa útflutningsmøguleikar fyri føroyskt framleiddar vørur

Miðvís marknaðarføring, økt framleiðsla og søla av føroyskum gerandisvørum vil hava eina positiva ávirkan á okkara framleiðsluførleikar, søluførleikar, effektivitet, produktmenning og harvið kappingarføri og útflutningspotentiali. Samstundis vil ein lutfalslig øking av søluni av føroyskt framleiddum mótvegis útlendskum vørum minka innflutningin av útlendskum vørum og harvið gagna føroyska handilsjavnanum. Umframt at átakið skal koma føroyskum framleiðarum og brúkarum til góða hevur tað sostatt beinleiðis samfelagsligar og vinnuskapandi fyrimunir.

Átakið skal tosa til stoltleikan og ábyrgdarkensluna hjá føroyingum: Stoltleikan um, at føroyingar duga og megna at framleiða kappingarførar góðskuvørur og ábyrgdarkenslu fyri at føroysk framleiðsla gagnar okkara egna umhvørvi, arbeiðsmarknaði og búskapi.

Ætlanin er, at átakið við tíðini skal fevna um eitt so breitt úrval av føroyskum framleiðarum sum gjørligt. Í fyrsta umfari er talan um hesar framleiðarar av gerandisvørum:

MBM - Poul Hansen (Krás) - Kemilux - Damfar (Fóm ísur) - Bakkafrost - Kjøtbúðin - Vest Pack - Tavan (PrimaFisk) - ALS (Vakstrarhúsið í Sandavági)

JÓANNESAR PATURSSONAR GØTA 32–34 POSTBOKS 1145 FO 110 TÓRSHAVN FAROE ISLANDS
T: +298 347 150 F: +298 347 151 E: SAMBAND@SENDISTOVAN.FO W: **WWW.SENDISTOVAN.FO**